

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 07 - 2012

# ES ætlar sær tættari Arktis

ES ætlar at økja sítt virksemi í tí arktiska økinum, og samveldið vil hava fasta eygleiðarastøðu í Arktiska Ráðnum. Tað sæst í einum uppskoti, sum ES-nevndin legði fram í dag. Nevndin sigur, at tað er neyðugt at leggja nógv størri dent á gransking í Arktis, og at granskingin skal hava til endamáls at menna burðardygga tøkni innan virksemið at útvinna olju, gass og onnur evni í tí arktiska økinum. ES-nevndin sigur, at samveldið vil hava tættari samstarv við tey arktisku londini, og nevndin endurtekur tað gamla ynskið um, at ES vil hava støðu sum eygleiðari í Arktiska Ráðnum. Noreg hevur tikið undir við hesum, men Russland og Kanada hava sagt nei. ES-nevndin sigur í einum tíðindaskrivi, at ES vil fegið taka lut í einum mennandi samstarvi í Arktis. Nevndin vísir á veðurlagsbroytingarnar, og at tær hava serliga stóra ávirkan í tí arktiska økinum við umfatandi avleiðingum fyri vistfrøðina og fólkið, sum býr har. Men nevndin ger eisini vart við, at minkandi havísur ruddar slóð fyri nýggjum møguleikum innan silging, fiskivinnu, námsvinnu, oljuvinnu og gassvinnu. -Tílíkt virksemi í viðkvæmum umráðum krevur varsemi og strong umhvørviskrøv, og at tað er neyðugt at hugsa seg gjølla um, áðrenn leiðir verða latnar upp fyri nýggjum fiskiskapi, skrivar ES-nevndin.